# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvorjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**VW Golf**
VW Golf, árg. '89. Sýnaður des. 2001 í góðum standi og sær gott út. Nýlakeraður í jan. Til søluf fyri 15.000 kr.
*Tlf. 321229 ella 223360*

**Mazda 626**
Ein Mazda 626 2,0 - árg. '86. Hevur ongar plátur, men koyrir fínt. Heilt biliga til solu.
*Tlf. 332282 ella 253782*

**Sportfelgur**
4 næstan nýggjar sportfelgur við lítið brúktum dekkum 15" og 4 nógv brúktar sportfelgur, 14" eru til solu. Passa m.a. til Nissan Primera.
*Tlf. 221434*

**Volvo S40**
Volvo S40 1,6 - árg. '99 (2000 model) v/ 15" alufelgum og eyka felgum, anlegg v/ 4 cd-box, el-rútar o.o. eykaútgerð. Til sølu um hóskandi boð fæst. Er sera væl hildin.
*Tlf. 447744*

**Mazda 323**
Mazda 323 (sedan) árg. '88. Sýnaður í fjør. Til solu fyri 16.000 kr.
*Tlf. 332185 ella 261985*

**Opel Ascona**
Opel Ascona 1,6 til sølu. Prísuppskot: 5.000 kr.
*Tlf. 255430*

**BMW 525TD**
Vinreyður, nýsýnaður, til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 373199/227293*

**BMW 525TD**
BMW 525TD, vínreyður, nýsýnaður. Til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 373199 ella 227293*

**Peugeot 206**
Ein Peugeot 206, 110 hk, el-rútar, -spegl og hiti í setrinum. Koyrt 13.000 km til sølu fyri 135.000 kr. Størri bilur kann takast í býli.
*Tlf. 221434*

**TIL SØLU**
Peugot 405, árg. 89, til sølu. Bilurin sær gott út og koyrir vael.
*Tlf. 26 42 69*

**Hygg her!**
Ein sera vælhildin Renault Megane, árg. 12/'96. Vínreyður. Sær út sum nýggjur bæði uttan og innan. Sýnaður 12/'01. Selist vegna flyting til Danmarkar.
*Tlf. 283951*

**MERCEDES EYKALUTIR**
Til ein 190E árg. 89-90, aut. ynskjast frontdeilir til keyps, so sum forlyktir, blinklyktir, gittar, gittarramma, kúfangari, kolari, vífta.
*Tlf. 44 96 13 & 21 72 00*

## Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

**TIL SØLU**
Mitsubishi Lancer 1,8 Diesel, í góðum standi, til sølu fyri kr. 20.000.
*Tlf. 226022*

**Daihatsu Charade**
Daihatsu Charade G11, árg. '86. Er í góðum standi og nógvir eykalutir fylgja við. Til sølu fyri 8.000 kr. Hevur verið til sýn.
*Tlf. 332958 ella 260058*

**NISSAN MICRA 1.0**
frá okt. 2001, koyrt 8.000 km, til sølu fyri 100.000,00 kr, vegna keyp av størri bili. Bilurin er vælhildin. Nýprísur umleið 125.000 kr.
*Tlf. 25 68 91 - 42 32 81*

**Til sølu**
Toyota Corolla 1,3; árg. '86. Góðkendur sýn mai 2002. Biliga til sølu.
*Tlf. 318011*

**Ford Escort**
Ford Escort biliga til sølu. Hann hevur plátur.
*Ring tlf. 223403 ella 310566*

**VOLVO 460**
Árg. 08/95 koyrt 81.000 km 4 pikadekk á felgum fylgja við. Prísuppskot 90.000.
*Tlf. 448352 ella 258352*

**Ford Scorpio**
Ford Scorpio 2,8i Ghia, árg. '85. Í sera góðum standi til sølu. Ein til eykadeilir fylgir við.
*Tlf. 442151 ella 256133*

**FORD ESCORT**
Ford Escort Stationcar 1,8 Diesel, árg. des. 95, blámet., nýsýnaður og í góðum standi, koyrt 77.000 km, til sølu fyri 68.000 kr.
*Tlf. 216251*

**FORD ESCORT 1.8 TDI**
árg. 97, til sølu um hóskandi bo ðfæst. Hevur 17'' alufelgur, gáttir, hekkspoylara og instrumentpanelið er úr træi.
*Tlf. 228649*

**TOYOTA CAMRY**
Árg. 87, til sølu sum eykalutir.
*Tlf. 318238*

**FORD ESCORT**
árg. 95, nýsýnaður, koyrt 70.600 km, í sera góðum standi, biliga til sølu.
*Tlf. 312898 - 265580*

**TIL SØLU**
Citroën Saxo 1.5D til sølu, um hóskandi bo ðfæst. Árg. 97, koyrt 97.000 km, sýnaður í apr. 2002.
*Tlf. 254868*

**OPEL ASTRA 16i GLS**
Árg. 10/93, 128.000 km, sentrallás. Gev eitt boð!
*Tlf. 217846*

**NISSAN SUNNY 14 LX**
Frá 89, hevur koyrt 160000 km, og í sera góðum standi, til sølu fyri 30.000 kr.
*Tlf. 212223*

**Daihatsu Charade**
Daihatsu Charade G100, árg. '89. Nýsýnaður, í góðum standi til sølu fyri 10.000 kr.
*228347 ella 312515*

**Til solu**
Mazda 323 1.3 LX (BF), árg. '85, til sølu! Koyrir gott, men hevur nakrar »krossar« sum skulu gerast.
*Ring 321073 ella 262487*

**Til solu**
Toyota Corolla 1.6 Sol Sedan, árg. 2000 til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin hevur koyrt 19.000 km, og hevur el-rútar, el-spegl, aircondition, sportfelgur v.m.
*211191*

**Til sølu**
Reyður Citroën 1.9 Diesel, ársmodell 1996, koyrt 90.000 km. Sýnaður í mars 2002. Til sølu fyri 75.000 kr. Trygging og vegskattur fylgja við.
*Ring 332879 fyri nærri boð*

**Til sølu**
Nissan Micra, árg. '89, sýnaður 2001, biliga til solu.
*226700*

**Til sølu**
Ein Volvo 740 Turbo Diesel til sølu
*213195*

**Mazda 626**
Ein Mazda 626 2.0, árg. '86. Hevur ongar plátur, men koyrir fínt. Heilt biliga til solu.
*332282 ella 253782*

**Opel Omega til sølu**
Opel Omega 2.0, árg. '87. Nýsýnaður til sølu.
*287777*

**Toyota Carina II til sølu**
Toyota Carina II, árg. 1987, til sølu fyri 10.000 kr. Bilurin er í góðum satndi, m.a. hevur hann skift motor, bremsirør o.a. Sýnaður í 2001
*263217*

**Sportfelgur til sølu**
15" alufelgur við dekkum til sølu fyri 2.000 kr. Passa m.a. til Opel
*421128*

**Bilur til sølu**
Ford Sierra árg. 1990. Vøruvognur.
*311882 ella 265726*

**Til sølu**
Mazda 323 frá okt. 1986 og nakað av eykalutum til sølu fyri 5.000 kr.
*449455 ella 262324*

**TIL SØLU**
Ein Volvo 240, diesel, árg. 89, nýsýnaður.
*Tlf. 252072*

**TIL SØLU**
Nissan Bluebirde Stationcar til sølu
*Tlf. 224910*

## Amboð

**TIL SØLU**
Lítið brúktur blásarið á stativið sum gevur max 1300 l/min. Blivur drivin av eini ASEA elmotorið 3*380v -5,5kw. Vælegnaður til at turka hoyggj við. Prisur 5000,- kr.
*Tlf. 448302*

**Til sølu**
El-Flymo Gardenvac. uppsamlari til bløð av trøðum og annað avfall til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. 441145*

**Til solu**
El-Flymo sláðimaskina, 40cm br. til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 441145*

**Toskalína til sølu**
Nakað av góðari 5mm toskalínu biliga til solu. Longd: 360 fv. uml. 270 húkar.
*373379 ella 288379*

**TIL SØLU**
Ein miniGolf sláðimaskina 5 hk, dupultan kniv 90 cm, til solu fyri 10.000 kr., nýprísur 13.700,-. 1 ára gomul, onki brúkt.
*Telefon 221044 ella 455866*

**TIL SØLU**
Ein brúktur Emco-Rex b20 avrættari og tjúgdarhøvul og eitt brúkt sagaborð til solu.
*Tlf. 316155 ella 210556*

## Arbeiði

**Venjarar!**
Øll, sum hava áhuga í at vera venjarar hjá Støkk komandi fimleikaár, eru vælkomin at ringja á tlf. 222447 áðrenn 9. august og hoyra nærri.
*Fimleikafelagið Støkk*

**Reingerð**
Reingerð ynskist til umleið 3 tímar um vikuna.
*319111*

**YMISKT UTRAGARÐSARBEIÐI**
verður gjort.
*Tlf. 310352*

**SMÆRRI UTRAGARÐSARBEIÐI**
verður gjort skjótt og væl. Ring
*tlf. +45 29282738 - 315419*

## Barnaansing

**DAGRØKTARMAMMA**
søkist til Jórunn, 5 ár, ca.65% arb.tíð, sum skjótast. Ring
*tlf.310753/004792629235 (jessie)*

**BARNAANSING/HÚSHJÁLP**
Vit søkja eftir ungari gentu, sum kundi hugsað sær at arbeitt sum húshjálp í Danmark og passa tvey børn í aldrinum 6 og 9 ár. Byrja 1. september.
*Tlf. 0045 76968085*

**DAGRØKTARMAMMA**
søkist til Jórunn 5 ár - 65% arb.tíð, skjótast!!Ring
004792629235/310753
*(spyr eftir Jessie )*

**Hjálp!**
Er onkur, ið kann ansa mær (Rutt 2 ár) seinnapartar meðan mamma er í skúla. Gott um onkur var at spæla við. Ring
*220011 ella 456447*

## Barnaútgerð

**Til sølu**
Bláur Brio keyristólur við galesju, regnslag og føroyskum skinnposa fyri 1.400 kr.
*Tlf. 317332*

**Chicco bilstólur**
Chicco bilstólur 9-18 kg til sølu fyri 800 kr. Nýprísur: 1.500 kr. Sær út sum nýggjur (myrkbláður við lítlum bamsum).
*Ring tlf. 321075*

**Til sølu**
Myrkbláur Brio barnavognur við puslitasku og lyft. Bert brúkt til eitt barn, til solu fyri 1.800 kr.
*Tlf. 424224 ella 214224*

**Til sølu**
Barnastólur við galesju til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. 455732*

**TIL SØLU**
3 ára gamal Brio barnavognur til solu fyri 1000,- kr. Tilhoyrandi babylift og regnskjól fylgja við.
*Tel. 312004*

**Til sølu**
1 leður-look grá babylift: 300 kr.1 stativ v/ baðikar: 300 kr.
*Tlf. 421142*

**Til sølu**
Myrkablá, babylift og myrkablátt systkinasetur biliga til sølu. Selist samlað ella hvør sær.
*Tlf. 212499*

**Ynskist**
Er tað nakar, ið kann selja mær eitt eldri model av Brio? (frá uml. 1990).
*Vinarliga ringi 318024*

**Barnavognur til sølu**
Ein grønur Silver Cross barnavognur við madrassu, kurv og flugunetið til sølu fyri 2.000 kr. (nýprísur: 5.200 kr.).
*319888 ella 253273*

**Til sølu**
Myrkabláur Odder barnavognur í góðum standi til solu fyri 1.500 kr.
*319549*

**TIL SØLU**
Bláur Brio barnavognur v/ babylift, í góðum standi, til slu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 318701*

**TIL SØLU**
Simo barnavognur v/ madrassu og lufthjólum, 1.600 kr. Brio koyristólur v/ galesju og posa, 1.200 kr.
*Tlf. 311263*

**HYGG HER!**
Høgur barnastólur, 200 kr. Hvít leður babylift, 350 kr. Baby Björn beriseli, 350 kr. Klappstólur, 100 kr. Spælibilur, 200 kr. træhillar, 100 kr. stk.
*Tlf. 313858 ella 215858*

**KOYRISTÓLUR**
Ein grønur Odder koyristólur v/ galesju til solu fyri 1.100 kr.
*Tlf. 312192 ella 254620*

**Koyristólur**
Koyristólur við kalesju til solu fyri 700 kr.
*455732*

**Til sølu**
Ein gráur Brio koyristólur við posa til solu.
*455886*

**Bilstólur til sølu**
Vælviðfarin barnabilstólur av merkinum Concord Fixmax 9-25 kg. E-góðkendur. Kann eisini nýtast sum bilpúta. Til solu fyri 600 kr.
*312605*

**TIL SØLU**
Ein Hokus Pokus barnastólur til solu fyri 250 kr.
*Tlf. 254406*

## Bátaútgerð

**Aluminium fiskakassar**
4 aluminium fiskakassar á 500 kg. stk. til solu fyri 3.000 kr. stk.
*Tlf. 444314, best eftir kl. 18.00*

**Ekkolodd**
Brúkt litekkolodd t.d. Fuso 50 kHz ynskit til keyps.
*Tlf. 222102*

**8-mannafar til solu**
Í góðum standi, hevur fiskiloyvi, er klárur til fiskiskap.
*Tlf. 444079 ella 212405*

**Ein Skanti 3000**
VHF til solu. Fleiri eyka horn kunnu setast til. Er sum spildurnýggjur - ongantið settur upp - selist fyri 3.800 kr.
*332888*

**Til solu**
22 fót føroysktbygdur bátur v/ fiskiloyvi og linuspæli.
*456326 ella 287726*

**Seksæringur**
Seksæringur til solu um nóg høgt boð fæst.
*281586*

**Seksæringur**
Seksæringur ynskist til keyps við fiskiloyvi, snellum og línuspæli.Prísuppskot: 100.000 kr.
*256914 ella 441675*

## Bingo

**Bingo**
Gott bingo verður í TB-húsinum: Tórsdagin 1. august kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
*Tvøroyrar Bóltfelag*

**BINGO**
verður í Pálsstovu leygardagin 27. juli kl. 15.00. Gávukort til oll spølini. 500 kr. til fulla plátu + síðuvinningar. Á lutaseðli 3x1.000 kr. Bingola. Eykaspæl. Koyring heim.
*Kiwanisfelagið Rósan*



**Bingo**
Bingo verður í Stórhúshøll, í Fuglafirði, leygardagin 27. juli kl. 16. Á lutaseðli: Lamb í heyst.
*Eldrafelagið Borgin*

## Bøkur

**Til sølu**
»Samtaler over Luthers lille katekismus«, Meyers forlag 1891, 200 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
»Odhams Wem Atlas of the world«, 150 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
Jul Schovelin: »Købmandens handbog«, 1916, 150 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
W. L. Emmersson: »På vandring med mesteren«, 1+2, 150 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
Lis Thorbjørnson: »Hvad hænder skabte«, 1964, 300 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
Harald W. Møller: »Leksikon årbogen 1958«, 250 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
Thv. Kristensen: »Evigheden banker på«, 30 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
»Samtaler over LUTHERS lille katekismus«, Meyers forlag 1891, 200 kr.
*321915 ella 220660*

## Brævaskifti

**Ungarn kallar!**
Eg eri ein 57 ára gomul kvinna við stórum áhuga í ollum føroyskum - søgu, landalæru, mentan o.ø. Ynski brævasamband við onkran úr Føroyum. Hevur hetta tín áhuga, skriva so (á enskum) til:Manulek ZsuzsaJókai u.3.2211 VasadHungary
*e-mail: manulek@freemail.hu*

## Burturm. /funnið

**Hey tit á Sandoynni!**
Er tað nakar, ið hevur funnið mína fartelefon: Nokia 3310. Misti hana 21. juli á veg úr Skálavík til farstøðina í Havn. Vinarliga ringið til mín, Ragnar, á
*tlf. 315660 ella 211956*

**FUNNIÐ**
Brosja (hvalur) funnin í Skálanum eftir Eldrahugnan, sum var tann 26.06.02. Eigarin fær hana við at ringja á
*tlf. 455439 ella 455164*

## Býli

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Tilkomið par ynskir íbúð í Havn. Alt hevur áhuga. Skriva til: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn,
*Bill. mrk. 052*

**Neyðarróp!!!**
Familja, 2 vaksin við 3 børnum, søkja hús / íbúð við min. 2 kømurum til leigu í Tórshavnar kommunu frá 1. sept. fyri sámuligan prís. Roykja / drekka ikki. Fara væl um og gjalda rættstundis. Hvør kann hjálpa okkum?
*Vinarliga ringið á tlf. 319428*

**Hús ella íbúð**
Vegna serligar umstøður eru vit heimsleys eftir einari nátt. Vit leita so inniliga eftir íbúð. Vit eru 40, 32 og 6 ár. Hava fast arbeið. Max. 4.000 kr. v/ ljós og hita.
*Tlf. 264543 ella 321026*

**Íbúð / kamar ynskist í Ha**
19 ára gamal drongur leitar eftir íbúð í Havn skótast gjørligt. Alt hevur áhuga.
*Tlf. 250896*

**Íbúð í Fuglafirði**
Verilsir til leigu í Fuglafirði.
*Tlf. 258961*

**ÍBÚÐ SØKIST**
Kvinna við einum skúlabarni søkir íbúð í Havn. Eru friðarlig og fara væl um.
*Tlf. 255212*

**Hjálp!**
Eg skal byrja á Fiskivinnuskúlanum 19.08.02 og eri húsavill. Er eingin á streymoynni, ið hevur eina íbúð ella hús til mín. Eg gjaldið til tíðina og fari væl um.
*Ringið tlf. 261628 ella 264621*

**Ynskist**
Sjúkrasystir søkir lítil hugnalig hús ella góða íbúð til leigu í Havnini frá 1. sept.
*Tlf. 316027 ella 316407*

**Til leigu**
Hús við 3 kømurum, ein stór stova, køkur, wc við bað og hjalli. Liggja í barnavinarligum umhvørvið. Til leigu fyri 8.500 kr. við olju.
*Bill.mrk 490*

**Íbúð á Argjum**
1. aug. verða stova, køkur, kamar og baðirúm útleigað fyri 4.500 kr. um mór. íroknað ljós og hita. Dep. 2.000 kr. við innflytan.
*Bill.mrk. 027*

**SOS**
Íbúð ella hús ynskist til leigu á Ólavsøku. Prísin kunnu vit tosa um.
*214721*

**Feriuíbúð**
Nørrebro / København:2-rúms íbúð við brúsuniche / toilet, køkur, 4 seingjapláss. 10 min. við bussinum til centrum. Grøn umráðir (hugnalig atmosfera), tætt við sjógvarnar. Til leigu í viku 32, 33, 34, 35. Kostnaður: 2.200 kr. / viku.
*(0045) 35830112*

**Møblerað hús í Havn til**
Gott, møblerað hús í Havn - liggur væl fyri við góðum útsýni og urtagarði - til leigu í 1-3 mánaðir. Stór stova, 3 kømur (6 seingjapláss), køkur og bað.
*223236*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Ungt par ynskir íbúð til leigu í Havn beinanvegin. Vit fara væl um og gjalda rættstundis. Leiga max. 4.500 kr. um mór.
*Tlf. 262237 - 262237*

**SØKT VERÐUR EFTIR**
lítlari íbúð í Tórshavn frá 01.09 2002. Vit fara væl um og gjalda rættstundis.
*Telefon nr. 265755*

**ÍBÚÐ Í OSLO TIL LEIGU**
Skal du til Oslo i sommer kan du/dere leie vår lelighet 2 sverrom storstue med altan kjøkken + bad leies ut mellom august og september kr 500 pr døgn ta kontokt på denne emailen her dorris_62@hotmail.com.
*eller tlf 22269252*

**Haldið frí í Eysturoy**
Kundi tú hugsað tær at ferðast í Eysturoy, kanst tú velja, um tú vilt búgva í summarhúsi ella í nútimans íbúð á eystara armi á Skálafjørðinum. Ringið
*447451 helst um morgunin*

**Íbúð ynskist**
Vit mangla eina íbúð til leigu sum skjótast. Dótturin skal byrja á vøggustovu í aug. Vinarliga ringið á
*370134 ella 255015*

**Íbúð søkist**
Par við 2 børnum søkja íbúð í Havn skjótast tilber. Má hava 2 kømur. Fara væl um og gjalda til tíðina.
*255913*

**Ynskist**
Hús ella íbúð, í Klaksvík ella Havn, ynskist til leigu skótast gjørligt. Til ungt par, bæði sigla úti, gjalda til tíðina.
*264708*

**ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN**
Ungur, friðarligur maður, sum ikki roykir ella drekkur, ynskir íbúð í Havn. Gjaldi rættstundis.
*Tlf. 448588 lok. 125, ella 224588*

**EIGARAÍBÚÐ TIL LEIGU**
112 fermetrar, trý kømur, stova og køkur í einum, gongd, 2 wc, durur. Íbúðin er í stovuhædd við góðum útsýni. Partvís møbleræd. Prísuppskot 7.500 kr. um mór. v/ el og hita.
*Tlf. 314928*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
96 fermetrar, tvey kømur, køkur og stova. Kostnaður 6.500 kr. v/ el og hita.
*Tlf. 313339, best sein á kvøldi*

**Gula húsið í Mikinesi**
Væl egnað til bólkar eins og einstaklingar. Allir hentleikar eru í húsinum. Boða frá í góðari tíð
*332614, 318468, 225090 ella fax 333614*

**Íbúð í Havn til leigu**
Stór ljós loftsíbúð í vesturbýnum, 3 min. frá Læraraskúlanum til leigu frá 01.09.2002 fyribils eitt ár, til friðarlig fólk uttan børn
*Bill.mrk. 451*

**HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST**
Hús/íbúð við goymsluhøli ynskist til leigu í Tórshavnar-umráðnum.
*Tlf. 224910*

**SKRIVSTOVUHØLI**
til leigu í miðbýnum. 190 fermetrar. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
*Bill. mrk. 1318-2*

## Dýr

**Fuglabúr**
Brúkt fuglabúr ynskist til keyps.
*Ring tlf. 321702*

**Kettlingur**
Hvítur kettlingur fæst.
*Ring tlf. 372555*

**Kettlingar**
1 sprøklutur og 2 svartir kettlingar fáast við avheintan. Bert til djóravin.
*Tlf. 255077 ella 316781*

**Til sølu**
4 kaninungar til sølu fyri 50 kr. stk. Tveir brúnir og tveir svartir. Bert til djóravin.
*423544 ella 253357, Elsa*

**Kettlingar**
Tveir sera fittir kettlingar, svartir og hvítir, ein ketta og ein frensur, kunnu heintast uml. 10. aug.
*314977 ella 214977*

**HESTUR TIL SØLU**
8 ára gamal, góður, íslendskur riðingarhestur til solu.
*Tlf. 319837, e. kl. 17*

**KETTLINGAR**
Triggir sra vakrir kettlingar, gráir/hvítur, verða latnir djóravinum.
*Tlf. 312075 / 253464*

**FRENSUR HORVIN**
2 ára gamal geldur frensur horvin frá Dalatroð 5 leygarnáttina 20. juli. Frensurin er stríputur svartur/brúnur, hevur grøna hálsreim við klokku í, tlf. nr. er eisini á reimini. Hevur nakar sæð hann ella veit um hann, vinarliga ringið
*Tlf. 312693*

**ER KETTA TÍN HORVIN?**
Morreyð ketta við svortum rípum, hvítari bringu, hvítum labbum og einum hvítum afturbeini hevur gingið í Turiðargøtu (á Ternuryggi) í nakrar dagar. Kettan tykist vera von við børn og er spøk og alskin.
*Ringið 317922, 217922, 215695*

**BURTURVILSTUR KETTLINGUR**
Gráur og hvítur kettlingur funnin á Lýðarsvegi. Tann sum eigur kettlingin kann ringja á
*tlf. 316864*

**FRENSUR BURTURBLIVIN**
Grástríputur frensur sloppin úr bili niðri á Bacalao, týsdagin 16/7. Hava tit sæð hann, ella vita um hann, vinarliga ring
*tlf. 26 58 69*

**HUNDAHVØLPAR**
Nýggju fittir hundahvølpar undan ektaðari labrador tík verða latnir djóravini. Vinarliga ringið
*228256*

**Ynskist**
Saðil ynskist fyri sámiligan prís.
*256785*

**Kettlingar**
Vit eru 3 fittir kettlingar. Ein gráur og hvítur, ein brúnstríputur og hvítur og ein svartur og hvítur. Er tað nakar, sum vil eiga okkum og verða góður við okkum?
*316121 ella 226570*

## Húsarhaldstól

**TIL SØLU**
Uppvaskimaskina og vaskimaskina sera biliga til solu. Ring
*tlf. 310753/004792629235 ( jessie)*

**Til sølu**
1 Vestfrost frystiboks biliga til solu.
*Tlf. 254460*

**Skunda tær!**
Vegna flyting selja vit 1 ára gamla Whirlpool vaskimaskinu - 4.500 kr.; Whirlpool turkitrumlu - 2.500 kr.; Whirlpool uppvaskimaskinu - 4.000 kr.
*313858 ella 215858*

**TIL SØLU**
Vaskimaskina og uppvaskimaskina biliga til solu.Ring
004792629235/310753
*(spyr eftir Jessie )*

## Innbúgv

**Klædnaskáp**
Vælhildið Frijsenborg klædnaskáp, 110cm langt, 200cm høgt, 63cm djúpt, til sølu fyri hálvan pris vegna plásstrot. Nýprísur: 4.400 kr.
*Ringi 221881*

**Skrivstovustólar**
5 skrivstovustólar, at sláa út, til sølu fyri 50 kr. stk. 1 sofaborð, ovalt. Sum nýtt. Mál: longd 130cm; breidd 75cm.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**TIL SØLU**
Tvær boxmadrassir og ein reol 150 cm breið, úr bókarviði, sera biliga til sølu.
*tlf. 310753/004792629235 ( jessie)*

**Træpersiennur til sølu!**
Kirsuberpersiennur til sølu. 6 stk. á 90x115cm. 1 stk. á 130x115cm. Seljast biliga ella hvør sær.
*Tlf. 212499*

**Gavl til sølu!**
Hvíttpigmenterað gavl til song 180cm breitt, selist biliga.
*Tlf. 212499*

**Til sølu**
Spísistovuborð og 6 stólar til sølu vegna plásstrot.
*Tlf. 258908*

**Til sølu**
Box-madrassa (120 x 200) við toppmadrassu og beinum í sera góðum standi til sølu fyri 1.200 kr. Eisini ein sovisofa, sum kann sláast út til dupultsong (við pútum) 700 kr.
*Tlf. 441043*

**Til sølu**
1 hvít borðpláta 90 x 60 cm biliga til sølu.
*Tlf. 254460*

**Ynskist**
Er tað nakar, ið hevur: 1 svartan lenistól við skamli; 1 vetrinuskáp - max 125cm breitt.1 gongsmøbil + spegl biliga til sølu
*321718*

**TIL SØLU**
Gomul 3 pers. sofa + tveir stólar.
*Tlf. 216717*

**TIL SØLU**
Reol, 150 cm breið, úr bókarviði, og tvær boxmadrassur v. 4 beinum. Ring 004792629235/310753
*(spyr eftir Jessie )*

**Til sølu**
Tveymannssofa + 2 stólar, lítið brúkt, til sølu. Møblarnir eru úr sera sterkum strái. Eisini er pultur úr furu til solu.
*317671*

**Til sølu**
Hvitt borð 90cm x 160cm + 1 pláta 50cm, avrundaðir kantar, l-bein, v/ 6 pólstraðum barberstólum til solu fyri 750 kr.
*265898*

**BOXMADRASSA**
Ein Boksmadras við hvítum høvdalagi og beinum verður seld fyri kr. 1200. Nýprísur umleið 3000 kr.
*ring 317376*

**Til sølu**
Vegna flyting selja vit boxmadrassur, kommodur, sofur, skenkar, reolsystemir, borð, stólar, sjónvarp og video o.a. Støkk inn á gólvið ella ring og fá meir at vita
*261374*

**Reol**
Reol úr viði, hædd 140cm, breidd 80cm, longd 72cm. Reolin, sum er 4 mør. er sett saman og smurd. Selist fyri 1.000 kr. Nýprísur: 1.400 kr.
*261346*

## Leikur

**Dukkuvognur**
Ein lítið brúktur dukkuvognur til sølu.
*Tlf. 373091*

## Lutaseðlar

**Vágs Kappróðrarfelag**
Vínnaramir av lutaseðlinum hjá Vágs Kappróðrarfelag eru hesir: 1. nr. 5657; 2. nr. 1303; 3. nr. 5973; 4. nr. 1124; 5. nr. 1558; 6. nr. 0782; 7. nr. 5580; 8. nr. 4704; 9. nr. 1107; 10. nr. 0702; 11. nr. 4401. Vinningarnir kunnu avheintast við at ringja á
*tlf. 254799 ella 373299*

**LJÓMUR**
Heimabingo hjá Ljómi er drigið, hesi telefon. Nr hava vunnið: 1. 263076 – 2. 315078 – 3. 372150 – 4. 211488 – 5. 370546 – 6.371005 – 7. 257354 – 8. 257354 – 9. 373782 – 10. 370345 – 11. 212324 – 12. 373234. Vinningar verða latnir, táið vit koma aftur úr Danmørk. Vit takka hjartaliga fyri stuðulin.
Heilsan
*Ljómur*

## Matur

**Ynskist**
Túrr grind og turt salt spik ynskist. Góður prísur kann gjaldast.
*252897*

## Pløgg

**Til Ólavsøku**
Bláttovið fyriklæð og turrklæð, std. 10-12 ár. Brúkt einaferð. 1.200 kr. Troyggja fylgir við ókeypis, std. Small.
*Tlf. 266755*

**Til Ólavsøku**
Hvíttovið fyriklæð og turrklæð til vaksin, til solu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 266755*

**Til sølu**
3 mallur til tann føroyska búnan. Av slagnum »hestaskógvur«.
*Tlf. 256756 ella 333046*

**Til kvinnubúnan**
Sera vakurt fyriklæði, turrklæði og kýsi, úr bláum silki. Broderað við hvítum, ljósareyðum og rosa lítum. Std. M. Til solu vegna serligar umstøður. Hevur verið brúkt, men er í góðum standi. Prísur: 3.000 kr.
*Tlf. 313667 ella 421424*

**Føroysk klæði**
Blátt broderað turrklæði, kýsi og fyriklæði - std. S-M til solu fyri 1.900 kr. - Blátt hondmálað turr- og fyriklæði til solu fyri 550 kr. - std. 6 ár.
*Ringið tlf. 310480*

**Føroysk klæði**
Reyð / svørt troyggja - std. 12-14 ár til solu fyri 1.500 kr. Reyð / svørt / grøn troyggja - std. 38 til solu fyri 1.200 kr.
*Ringið tlf. 310480*

**Hosur til dreingjabúna**
Nýggjar hosur til dreingjabúna, uml. 5 ár. Hosurnar eru bláar. Kostnaður 160 kr.
*Tlf. 320370 ella 313896*

**Til sølu**
Ein hondbundin troyggja til føroyska kvinnubúnan.
*252375 best aftaná kl. 17.00*

**BRÚKT DAMUKLÆÐI**
std. 38-40, til solu.
*Tlf. 311208*

**KNAPPATROYGGJA & HOSUR**
Nýggj, hondbundin, myrkablá knappatroyggja og ljósa- og myrkabláar hosur til solu.
*Tlf. 314699 - 265898*

**TROYGGJA OG HOSUR**
til føroyska mannfólkabúnan til solu. Stødd M/L.
*Tlf. 422220*

**TROYGGJA**
til føroyska manfólkabúnan, stødd M/L til solu.
*Ringið 312927 ella 312156*

**Til sølu**
Brúkt føroysk klæðir til 6-7 ára gamlan drong.
*319946*

**Mallir til sølu**
3 mallir av slagnum Hildur (Niels Arge) til solu.
*223333, Nina*

**YNSKIST**
Ein malla (smæran - einkult blað) til føroysk klæði ynskist til keyps.
*Tlf. 314539*

**Brúðarkjóli**
Ein ráhvítur »Lilly« brúðarkjóli str. 40-42 til solu. Slør við diadem og handskar fylgir við . Er brúkt einaferð
*422636*

**Til sølu**
Skjúrt til føroysk klæðir, longd 110cm, breidd 72cm, til solu fyri 2.200 kr.
*265578, eftir kl. 16.00*

**Til sølu**
Gentu-skjúrt til føroysk klæðir, longd 70cm, breidd 62cm, til solu fyri 1.500 kr.
*312874*

## Sjavs

**Sjavskapping**
Almenn sjavskapping verður á Kafé Blákross týsdagin 30. juli kl. 19.00.
*Kafé Blákross*

**Sjavskapping**
Almenn sjavskapping verður í Hæddini leygardagin 27.07.2002 kl. 18.00.
*Eldrafelagið Nón*

## Súklur

**Dreingja- / gentusúkkla**
Ein 20" dreingja- / gentusúkkla uml. 6-8 ár, uttan gear v/ fótbremsum til solu fyri 400 kr.
*Tlf. 448173 ella 218173*

**Til sølu**
Súkkla til 4-6 ára gamla gentu til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 317481 ella 265568*

**Til sølu**
Ein Yamaha knallert í góðum standi til solu fyri 8.000 kr. Eisini ein Flymo plenuklippari fyri 700 kr.
*Tlf. 422027*

**Skutari til sølu!**
Svartur Aprilia Sonic 50 keyptur í apríl 2001. Hjálmur fylgir við.
*Tlf. 320561 ella 264944*

**Til sølu**
Ein Honda X8RS skutari við tveimum hjálmum. Bert koyrt 1.100 km. til sølu fyri 16.000 kr.
*315723*

**Skutari til sølu**
Ein 3 ára gamal Suzuki Katana í góðum standi til solu fyri 11.000 kr.
*254040*

**Scootari til sølu**
Kom og royn og bjóða uppá ein 1 1/2 ára gamlan reyðan SYM scootara. Koyrt uml. 2.500 km. Hjálmur fylgir við
*223333*

**Motorsúkkla til sølu**
Yamaha FZ750, árg. '91, koyrt 43.000. Í góðum standi til solu.
*215291 ella 455291*

**Til sølu**
Ein Aprilia RS50 til solu. Hevur koyrt 5.500 km. sær gott út. Til solu um hóskandi boð fæst.
*316365 ella 251048*

**TIL SØLU**
Lítil og onki brúkt 1 ára gomul blá dreingjasúkkla av merkinum Mousquito, 24'' (12 ár) við hond og fótbremsu. Nýprísur 3200 nú 1800 kr.
*ring 221577*

## Teldur

**MEGA GOTT TILBOÐ!**
Ein sera skjót Advent fartelda til solu. Hon hevur 1100 MHz prossesara, 30 GB harddisk 256 MB ram 14,1" TFT Skerm, SIS graffikkort, kann stillast 8-64 MB